





# Heystmótasýning í miðbýnum

**MÓTASÝNING**
*Ella Larsen*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Hóskvøldið skipaðu handlarnir í miðbýnum saman við kunningarstovuni fyri mótasýning á Hotel Tórshavn.

Talan var um afturvendandi heystmótasýningina, sum hevur verið á ymiskum støðum tey síðstu mongu árini. Hetta er fyrstu ferð at mótasýningin varð hildin á Hotel Tórshavn.

Klæðini, ið sýnd vóru fram, vóru bæði til børn og vaksin. Nýggjasti heystmótin varð sýndur fram, samstundis við at tað var møguleiki at fáa íblástur til klæðini til jólaborðhaldið.

Fleiri enn 100 fólk vóru komin til mótasýningina, sum var útseld.

Handlarnir ið sýndu fram vóru: Niels Arge, Bamsan og Total, Diva, Fljóðið, Fótbúni,

Gloss, Kallkyn, Kissa, Listir, Mótaskálin, Skálabúðin, Touché, Vogue og

Wrangler Shop. Í steðginum vísti Royal Hárfríðkan hármóta.





